# Citroën Picasso til sjey ferðandi í 2006



*Citroën Xsara Picasso 2006. Designið verður meira »agressivt« og linjurnar ikki so rundar sum á núverandi Picasso. Kølaragittarið verður eins og á øllum nýggjum Citroën við innbygdum Citroën logo*

**Rúmligi og praktiski familjubilurin Citroën Xsara Picasso fær ein avloysara við sama navni í 2006. Eins og við Renault Scénic er ætlanin at Picasso eisini verður gjørdur í forlongdari útgávu til sjey ferðandi**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Síðan Citroën Xsara Picasso kom á marknaðin fyri nøkrum árum síðan, fáast fleiri av kappingarneytunum nú sum 7 persónabilar. Soleiðis verður eisini við Picasso, sum kemur á marknaðin í 2006.

Eins og við Renault Scénic er ætlanin at Picasso verður gjørdur bæði sum fimm- og sjey persónabilur í forlongdari útgávu.

Designið verður meira »agressivt« og linjurnar ikki so rundar sum á núverandi Picasso. Kølaragittarið verður eins og á øllum nýggjum Citroën við innbygdum Citroën logo. Innrættingin verður liðilig, og aftaru setrini kunnu leggjast heilt niður í dúrkið.

Tað er familjan hjá listamanninum, sum hevur givið Citroën loyvi til at brúka navnið Picasso.



*Picasso XXL (extra large). Eftir ætlan verður Picasso eisini gjørdur sum 7-persónabilur í longdari útgávu*

BMW X4C:

# Off-road coupé frá BMW í 2007

**BMW X4C skal vera bilurin til teirra, ið ynskja sær ein smartan coupé við »off-road« eginleikum. Bilurin er enn ein konseptbilur. Um X4C verður veruleiki, kemur hann í fyrsta lagi á marknaðin í 2007**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

BMW hava ætlanir um at koma við hesum sera snøgga X4C, sum enn er konseptbilur, inn í millum frítíðarbilarnar X3 og X5.

Bilarnir líkjast so avgjørt ikki. Meðan X3 og X5 eru jeepar av útsjónd, er hesin ein sportscoupé.

X4C skal vera bilurin til teirra, ið ynskja sær ein smartan coupé við »off-road« eginleikum, so tey uttan trupulleikar kunnu koma fram til t.d. frítíðarsmáttuna í fjøllunum.

X4C fær nýggju 4x4 skipanina »X-drive«, ið er ein sera framkomin skipan, sum deilir kraftina millum for- og bakhjólini eftir tørvi.

Um bilurin verður veruleiki, kemur hann í fyrsta lagi á marknaðin í 2007.

Ikki eru nógvir upplýsingar tøkir um bilin enn, men flest øll kunnu vera samd um, at X4C er ein sera snøggur bilur.



*Um X4 verður veruleiki, kemur hann í fyrsta lagi á marknaðin í 2007*